2025

# Sáttmáli millum

# Kommunala Arbeiðsgevarafelagið & Maskinmeistarafelagið

FYRI SEV OG IRF

# Sáttmáli millum KAF og MF galdandi frá 1. oktober 2022

## Indhold


§ 1. Starvsetan ..... 2

§ 2. Lønir ..... 2

§.  3. Eftirlønarskipan ..... 4

§ 4. Arbeiðstíð ..... 4

§ 4a. Arbeiði í Vaktarskipan ..... 4

§ 5. Eykagjøld/vaktargjøld ..... 5

§ 6. Tímaløn. ..... 5

§ 7. Úrtíðarløn. ..... 6

§ 8. Fastir frídagar ..... 7

§ 9. Frítíðarreglur ..... 7

§ 10. Vaktarbroyting ..... 7

§ 11. Fyribils tænasta í hægri starvi ..... 7

§ 12. Skipanarreglur ..... 7

§ 13. Farloyvi ..... 8

§ 14. Tænastuferðir ..... 8

§ 15. Flytisamsýning ..... 9

§ 16. Koyripeningur ..... 9

§ 17. Arbeiðsklæðir ..... 9

§ 18. Sjúka og eftirsitiløn ..... 9

§. 19. Barnferð ..... 9

§ 20. Uppsøgn ..... 10

§ 21. Seming og tulking av sáttmálanum ..... 11

§  22. Maskinmeistarar í leiðandi størvum ..... 11

§  23. Gildi sáttmálans ..... 11

Protokolat ..... 11

Ískoytið ..... 13

Viðbøtur pr. mánað eftir § 1 stk. 2 í sáttmálanum ..... 15

# Sáttmáli millum KAF og MF galdandi frá 1. oktober 2022

## § 1. Starvsetan

Hesin sáttmálin fevnir um maskinmeistarar í tænastu hjá SEV og IRF.

Stk. 2.Um so er, at starvið arbeiðsliga, fyrisitingarliga ella á annan hátt hevur eina tílíka serstøðu, at tað ikki er umfatað av teimum vanligu fortreytum fyri niðanfyri ásettu lønum v. m., verður maskinmeistara veitt eykaviðbót. Viðbøtur og møguligar aðrar sømdir verða veittar eftir avtalu millum KAF og Maskinmeistarafelagið (viðbøturnar hækka til eina og hvørja tíð við sama % sum lønirnar).
1. Vaktmeistarar, sum verða løntir eftir 12. lønarflokki, fáa fyri serliga ábyrgd eina mánaðarliga viðbót, sum er upphæddin í bólki “d” í viðbótartalvuni.

Broytingin er galdandi frá 1. januar 2021.

Stk. 3.Tá ið starv verður lýst leyst, skal tað lýsast leyst alment á ein slíkan hátt, at almenningurin verður kunnugur við lýsingina. Lýsast skal, hvat starvið umfatar, og hvørjum lønarflokki starvið verður lønt eftir.
Um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir, er ikki neyðugt, at starvið verður lýst leyst alment.

Stk 4. Tá ið starvið er sett, skal tann, ið starvið hevur fingið, í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina fáa setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:
1. navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
2. nær setanin tekur við,
3. galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir,
4. starvsheiti,
5. bólking,
6. eftirlønargjald
7. starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
8. uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og tí setta,
9. arbeiðstíð, (ásetast um maskinmeistari er partur av vaktarskipan ella ikki)
10. frítíð við løn og frítíðaríkoyti,
11. setanarøki
12. arbeiðstaður/staðir.

Stk. 5. Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum fyri limir í Maskinmeistarafelagnum

*§ 1 stk 4 fær gildi 1. januar 2025.*

## § 2. Lønir

Maskinmeistarar verða løntir eftir hjáløgdu lønartalvum sambært setanartreytir.

Stk. 2. Teir áður avtalaðu 3 frídagarnir árliga verða varðveittir í sáttmálaskeiðinum.

Stk. 3. Persónar, ið hava maskinistprógv ella føroyska maskinmeistaraprógvið verða løntir í 8**.** lønarflokki.
Persónar við 2-ára maskinmeistaraútbúgving verða løntir í 9. lønarflokki.
Persónar við víðkaðari/3-ára maskinmeistaraútbúgving verða løntir í 10 lønarflokki.
Vaktmeistarar (1. maður á vakt á Fossáverkinum, Sundsverkinum og Vágsverkinum) verða løntir í 12**.** lønarflokki. Treytin fyri at vera í 12. lønarflokki ella hægri er víðkað/3 ára maskinmeistaraútbúgving.
Maskinmeistarar og maskinistar við el-tekniskum førleika verða løntir í ávikavist 12. og 10. lønarflokki.
1. meistarin í Suðuroy og á Sundi verða løntir í 15**.** lønarflokki.
Rakstrarleiðarin fyri Brennistøðina og Spilloljuverkið hjá IRF verður løntur í 15. lønarflokki.
Verkmeistarar í Norðoyggjum, Suðuroy og í Vestmanna verða løntir eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelag Føroya í lønarflokki 35.1.
Verkmeistarin á Sundi verður løntur eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelag Føroya í lønarflokki 36.1.
Varaverkmeistarin á Sundi er løntur eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelag Føroya í lønarflokki 35.1.
Varaverkmeistarin á Vágsverkinum verður flokkaður sambært stig 34.1 eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelag Føroya.
Deildarleiðarin á Framleiðsludeildini verður løntur eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelag Føroya í lønarflokki 37.1.

Stk. 4. Lønaraldur verður roknaður frá tí degi, viðkomandi hevur tikið seinasta prógv, um so er, at viðkomandi hevur tikist við maskinmeistaraarbeiði ella arbeiði, sum kann javnmetast við slíkt. Lønaraldurin verður rundaður uppeftir til heilan mánað.
Fyri størv, ið verða lønt í 16. lønarflokki ella hægri, verður lønaraldurin ásettur í samráð millum SEV/IRF og Maskinmeistarafelagið.

Stk. 5.

a)
Fyri maskinmeistarar við niðursettari arbeiðstíð verður lønin roknað lutfalsliga í mun til niðursetta tímatalið.

b)
Er talan um arbeiðstíð minni enn hálvtíðarstarv, verður lønaraldurin roknaður lutfalsliga í mun til niðursetta tímatalið. Aðrar arbeiðstíðir roknast at geva fullan lønaraldur.

Stk. 6.Onnur størv hjá SEV og IRF, har bæði fólk við maskinmeistaraútbúgving og øðrum útbúgvingum eru kvalifiseraði til viðkomandi starv, t. d. kaðal – og linjumeistarar og verkstaðarfólk, verða lønt eftir serstøkum avtalum, har fyrilit verður tikið fyri, hvussu slík størv sum heild verða lønt. Sáttmálin umfatar ikki størv, har einki krav er um maskinmeistaraútbúgving, t. d. teir, ið passa motorarnar á útoyggjum.

## §. 3. Eftirlønarskipan

Stk. 1. IRF og SEV rinda vegna starvsfólkið, til eina eftirlønarskipan, ið Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Maskinmeistarafelagið kunnu góðkenna, í eftirlønargjaldið 15 % av tí til eina og hvørja tíð galdandi mánaðarløn eftir lønartalvuni.
Stk. 2. Eftirløn verður ikki goldin av úrtíðarlønum, frítíðarískoyti, viðbótum, vaktargjøldum v.m.

## § 4. Arbeiðstíð

Stk. 1. Arbeiðstíðin sambært hesum sáttmála er 37 tímar um vikuna, mattíð ikki íroknað.
Hjá starvsfólki, sum ikki eru í vaktarskipan, er vanlig arbeiðstíð millum kl. 07.00 og kl. 18.00 yrkadagar

*§ 4 fær gildi 1. apríl 2025.*

## § 4a. Arbeiði í Vaktarskipan

Stk. 1. Arbeiði í vaktarskipan er arbeiði í støðugum rakstri á einum arbeiðsplássi í minst 2 mánaðar, har vaktarlið ella starvsfólk avloysa hvønn annan eftir einum fastløgdum vaktarlista.
Viðm.: Tað merkir, at skipan av eini vaktarskipan ikki kann setast styttri enn 2 mánaðir.

Stk. 2. Fyri starvsfólk, sum starvast í vaktarskipan, verður gjørd staðbundin arbeiðstíðarætlan.

Stk. 3. Vaktarskipanin inniheldur eina útrokning av ársnorminum. Í hesi útrokning skal ásetast, um man leggur føstu frídagarnar og 2. og 3. skiftistíma inn í vaktarskipanina.

Stk. 4. Miðalarbeiðstíðin í einum vaktartørni skal samsvara arbeiðstíðini samb. § 4 stk. 1. Starvsfólk skulu 5 vikur fram vita, nær tey skulu arbeiða, og nær tey hava frí.

Stk. 5. Vaktarskiftini skulu ganga frá degi til kvøld til nátt. Frítíðin millum vaktarskiftini skal helst vera minst 40 tímar, tó ikki minni enn 22 tímar.

Stk. 6. Frítíðin millum tær dagligu vaktirnar skal vera minst 15 tímar.

Stk. 7. Tá vaktarbroyting er neyðug, verður sagt frá í minsta lagi 72 tímar frammanundan. Um arbeitt verður í fráboðanartíðarskeiðnum verður latin yvirtíð eftir §7.

Stk. 8. Semja kann gerast millum partarnar á staðnum um vaktarskipan, sum víkir frá ásetingunum um vaktarskipan sambært sáttmálanum. Skjalfest staðbundin vaktarskipan skal góðkennast og váttast av leiðslu og umboði fyri starvsfólkini á staðnum.

Semjan kann skrivliga sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða freist.

Semjan verður send Maskinmeistarafelagnum og Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum til kunningar í seinasta lagi 14 dagar, áðrenn hon kemur í gildi. Hetta merkir, at Maskinmeistarafelagið og kommunala Arbeiðsgevarafelagið skulu staðfesta fyrstu avtaluna

*§ 4a fær gildi 1. apríl 2025.*

## § 5. Eykagjøld/vaktargjøld

Eykagjøldini eru:
Vaktargjald 1: 18 % av tímalønini á stig 8.
Vaktargjald 2: 36 % av tímalønini á stig 8.
Vaktargjald 3: 11 % av tímalønini á stig 8.

Fyri arbeiði yrkadagar frá kl. $17^{00}$ til $07^{00}$ verður latið eykagjald I
Fyri arbeiði frá kl. $17^{00}$ fríggjadag til $07^{00}$ mánamorgun verður latið eykagjald II
Fyri arbeiði halgidagar verður latið eykagjald II, og tá verða dagarnir roknaðir frá kl. $17^{00}$ kvøldi fyri til $24^{00}$.
Fyri arbeiði ólavsøku-, jóla-, nýggjársaftan, flaggdagin og grundlógardagin verður latið eykagjald II frá kl. $00^{00}$ til $24^{00}$ tá nevndu dagar ikki eru leygar-, sunnu- og halgidagar.
Fyri arbeiði millum kl. $00^{00}$ til $07^{00}$ verður veitt eykagjald III. Hetta er galdandi allar dagar.

Stk. 2. Maskinmeistarar, sum hava tilkallivakt afturat vanligari arbeiðstíð fáa sum samsýning undir tilkallivakt yrkadagar eykagjald I um tíman.
Fyri leygar-, sunnu- og halgidagar og føstu frídagarnar sambært §8 verður latið eykagjald II um tíman.
Gjaldið verður annars ásett eftir somu klokkutíðum sum í stk. 1.

Stk. 3.Tá vaktarskiftið er, skal maskinmeistari, ið kemur á vakt, møta 15 min. áðrenn klokkutíman, til at móttaka munnliga handan av vaktini. Hetta verður roknað sum vanlig arbeiðstíð.

Stk. 4. Nevndu eykagjøld verða ikki latin saman við úrtíðarløn, eins og úrtíðarløn ikki verður veitt undir tilkallivakt.
Fyri arbeiði undir tilkallivakt verður veitt úrtíðarløn sambært § 8.

Stk. 5. Fyri arbeiði í kvøld- og náttarvakt eigur maskinmeistari frí 4 tímar fyri hvørjar 37 tímar, arbeitt verður. Kvøldvakt og náttarvakt er arbeiðið, sum byrjar kl. 15:00 ella seinni.
Hvør kvøld- og náttarvakt telur við í mesta lagi 8 tímar. ( yrkadagar, leygar - og sunnudag og halgidagar).

## § 6. Tímaløn.

Tímaløn er bruttománaðarløn býtt sundur við 160. Bruttománaðarlønin er lønin sambært lønartalvu, men ikki eftirlønargjøld, úrtíðargjøld og serligar veitingar.

Stk. 2. Tá maskinmeistarar luttaka ein heilan dag í skeiðvirksemi, sum er fyriskipað av SEV/IRF vaktlistafrídagar, verður veitt teimum samsýning samsvarandi til 8 tímar dagløn, ella 8 tímar til avspáking.

Stk. 3.Tá maskinmeistari ynskir at luttaka á eftirútbúgvingarskeiðum, kann hann eftir umsókn fáa farloyvi til hetta uttan, partvís við, ella við løn. Skeiðkostnaðurin kann eftir umsókn endurrindast honum, tá SEV/IRF halda umstøðurnar tala fyri tí.

## § 7. Úrtíðarløn.

Úrtíðararbeiði eigur helst ikki at vera.
Fyri úrtíðararbeiði verður goldin úrtíðarløn afturat vanligu dagtímalønini soleiðis:

Fyri 1. , 2. og 3. tíman verður goldið 50 %.
Fyri 4. og eftirfylgjandi yvirtímar eins og fyri arbeiði leygar- , sunnu- og teir í § 8 nevndu frídagar 100%
Her verða dagarnir roknaðir frá kl. 00.00 til kl. 24.00.
Úrtíðargjald verður latið fyri hvønn ½ byrjaðan tíma.
Maskinmeistarar í lønarflokki 16 og uppeftir fáa ikki úrtíðarløn.
Tó skal, um álagt verður teimum drúgt úrtíðararbeiði, verða veitt teimum hóskandi samsýning eftir umsókn.

Stk. 2.
Úrtíðararbeiði kann verða avspákað.
Um maskinmeistari sjálvur ynskir, at so skal vera, og arbeiðið eftir ætlanini hjá SEV/IRF loyvir hesum, tá skal tað bera til, at maskinmeistari fær frítíð ígildis úrtíðararbeiði í mun til ásetingarnar í § 8. stk. 1. í hesum sáttmála. Ber ikki til at halda frí, tá maskinmeistari ynskir tað, skal avtalast, nær uppsparda frítíðin kann verða hildin ístaðin.
Maskinmeistari kann krevja, at hetta verður innan 3 mánaðir.
Har arbeitt verður eftir vaktarlista, skal tann avtalaða frítíðin fyri úrtíðararbeiði viðmerkjast í vaktskipanini, áðrenn hon verður hildin.

Stk. 3. Maskinmeistari sum hevur arbeitt sína fullu viku og eigur at hava frí, og sum tá verður biðin at koma á vakt áðrenn hann hevur havt frí í tveir fylgjandi dagar, hevur rætt til yvirtíð í 3. tær fyrstu vaktirnar.

*§ 7. stk 3 er strika frá 1. apríl 2025.*

Stk. 4. Fyri úrtíðararbeiði, ið fer út um 2 tímar, eiga maskinmeistarar rætt til ½ tíma mattíð uttan frádrátt.

Stk. 5. Verður maskinmeistari boðsendur til úrtíðararbeiði, tá viðkomandi er farin av arbeiðsplássinum aftan á loknan arbeiðsdag ella vakt, verður goldin úrtíðarløn fyri í minsta lagi 2 tímar, hóast úrtíðararbeiðið varar styttri tíð.
Hettar er ikki galdandi, um viðkomandi fær tilkallivaktgjald, reiðiviðbót ella aðra samsýning fyri útkall.

## § 8. Fastir frídagar

Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagurin, hvítusunnuaftan,
½ grundlógardagur, ½ Ólavsøkuaftan, Ólavsøkudagur og allir halgidagar eru frídagar.

Stk. 2. Gongur maskinmeistari vakt á teimum omanfyri nevndu frídøgum, verða hesir avspákaðir tíma fyri tíma.

## § 9. Frítíðarreglur

Frítíðarreglurnar verða sambært løgtingslóg nr.30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.
Stk. 2. Maskinmeistari, sum heldur frí við løn, verður veittur frítíðarpeningur, sum er 1½ % av føstu árslønini og 12 % av útgoldnari úrtíðarløn.

## § 10. Vaktarbroyting

Tá vaktarbroyting er neyðug, skal sigast frá í minsta lagi 24 tímar frammanundan. Er neyðugt at gera vaktarbroyting við styttri fráboðan enn 24 tímar, verður latið eykagjald kr. 350 einaferð.

*§ 10 verður strikað 1.apríl 2025.*

## § 11. Fyribils tænasta í hægri starvi

Maskinmeistarar, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi fyribils røkja hægri starv í 7 arbeiðsdagar og meira samfelt, eiga í hesum tíðarskeiði at verða løntir við somu løn, sum teir høvdu fingið, um teir vórðu settir í starvið

## § 12. Skipanarreglur

Á hvørjum verki sær velja maskinmeistararnir ein álitismann og ein varaálitismann.
Hesir velja sínámillum ein felagsálitismann og ein varafelagsálitismann at umboða øll verkini.
Valið av hesum hevur gildi, tá Maskinmeistarafelagið hevur boðað SEV/IRF frá.
Val av álitisfólkið skal verða annaðhvørt ár, tó ikki sama árið, sum sáttmálin gongur út.

Stk. 2 Til álitisfólk kann bara veljast tann, sum hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt á viðkomandi arbeiðsplássi í minsta lagi 1 ár.

Stk. 3. Í samráð við SEV/IRF fær álitismaðurin og/ella felagsálitismaðurin møguleika at taka sær av málum, sum viðvíkja starvsfeløgum ella arbeiðsviðurskiftum á verkunum í arbeiðstíðini, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt.

Stk.4. Álitisfólk hevur rætt og skyldu til at tingast við leiðsluna á arbeiðsplássinum, um mál sum stinga seg upp. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerðina hjá leiðsluni, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.

Stk. 5. Maskinmeistarar, sum eru valdir í nevnd Maskinmeistarafelagsins, skulu fáa heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju. Semja skal tó í hvørjum einstøkum føri vera millum SEV/IRF og Maskinmeistarafelagið um tørvin á slíkum arbeiði.

Stk. 6. Álitisfólkið hevur skyldu til at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir v.m., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samarbeiði limanna og leiðslunnar millum.

Stk. 7. Tá álitisfólk søkja at sleppa á álitisfólkaskeið, fer SEV/IRF at viðgera slíkar umsóknir við vælvild.
Sama er galdandi fyri nevndarlimir í Maskinmeistarafelagnum.

Stk. 8. Virkandi formaður í felagnum hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur stovnurin skyldu at hava starv til viðkomandi, tá ið formanstíðin er úti.

## § 13. Farloyvi

Maskinmeistari kann fáa tænastufrí uttan løn, tá tað ikki stríðir ímóti áhugamálunum hjá SEV/IRF. Maskinmeistari, sum fær farloyvi í samband við útbúgving, ið tænir áhugamálunum hjá SEV/IRF, kann fáa frí við løn ella niðursettari løn. Tænastufrí kann verða givin í upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi 4 ár. Tó skulu maskinmeistarar ið hava starvast longur enn 5 ár, altíð hava rætt til farloyvi í minst 1 ár.

## § 14. Tænastuferðir

Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í arbeiðsørindum verður samsýnt samsvarandi avtalu millum Tænastumannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Stk. 2. Ferðing í arbeiðsørindum til og frá ikki vanligum arbeiðsstað í Føroyum er at rokna sum arbeiðstíð.
Ferðing ímillum 22.00 og 07.00 verður ikki íroknað, um maskinmeistarin fær ávíst og goldið seingjarpláss.

Stk. 3.Útreiðslur, ið maskinmeistarin hevur av ferðing, uppihaldi og mati verður honum endurrindaðar móti rokning.

Stk. 4. Tíðin sum fer til ferðing til skeið uttanbíggja ella uttanlands verður roknað sum arbeiðstíð.

## § 15. Flytisamsýning

Um kraft verður av maskinmeistara, at hann flytur í annað stað at búgva, verða flutningsútreiðslur hansara av húski og húsbúnaði samsýndar honum eftir rokning.

## § 16. Koyripeningur

Samsýning fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum fyri SEV/IRF er hin sami sum fyri tænastumenn landsins ella eftir serligari avtalu millum SEV/IRF og Maskinmeistarafelagið.

## § 17. Arbeiðsklæðir

Reglugerðin um arbeiðsklæðir á el-verkunum, sum kom í gildi 1. apríl 1996, er galdandi í sáttmálaskeiðinum.
Partarnir samráðast í sáttmálaskeiðinum um eina endurskoðan av reglugerðini.

## § 18. Sjúka og eftirsitiløn

Viðvíkjandi sjúku og eftirsituløn galda reglurnar í starvsmannalógini, tó soleiðis, at eftirsituløn verður veitt í mun til uppsagnartíðini hjá viðkomandi, minst 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir. Eftirsitiløn verður eisini goldin til samlivandi.

Stk. 2. Maskinmeistari kann fáa frí við løn, tá barn/børn hansara eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hava teir meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu teir fáa frí upp til 20 dagar.

Stk. 3. Tá barn/børn hjá maskinmeistara verða løgd inn á sjúkrahús, og annað av foreldrunum verður innlagt við, kann maskinmeistari fáa frí við løn í upp til mest loyvda árliga dagatal sambært stk. 2.

Stk. 4. Maskinmeistarar, ið eru í fastari vaktarskipan og hava náttararbeiði meiri enn 300 tímar um árið hava rætt til ókeypis læknakanning einaferð um árið. Partarnir gera nærri reglur um hetta í sáttmálaskeiðinum.

## §. 19. Barnferð

Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

Stk. 2. Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinnan fara úr arbeiði við løn fram til føðing.
Eftir føðing fær starvskvinnan farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.

Stk. 3. Prógvar starvskvinnan við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør meir enn 4 vikur undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinnan hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.

Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið."

*§ 19. stk. 5 fær gildi fyri børn, sum fødd eftir 1. oktober 2024.*

## § 20. Uppsøgn

Starvsavtala millum SEV/IRF og maskinmeistara kann bert sigast upp til uppathald eftir eini freist, sum er givin frammanundan samsvarandi stk. 2., uttan so, at avtalað er, at arbeiðið er bert fyribils ella sum roynd, og at hesi arbeiðsviðurskifti vara ikki longur enn 6 mánaðir.
Prógvskylduna fyri, at tílík avtala er gjørd, hava SEV og IRF.

<u>Stk. 2.</u>Tilsagnarfreistin til uppathald frá SEV/IRF kann ikki setast styttri enn:
1 mánað freist til uppathald seinasta í einum mánað í fyrstu 6 mánaðar starvstíð.
3 mánað freist til uppathald seinasta í einum mánað eftir 6 mánaðar starvstíð.
Uppsagnarfreistin verður longd við 1 mánað fyri hvørt 3. starvsárið, tó longst í 6 mánaðar.

<u>Stk. 3.</u>Uppsøgn maskinmeistarans skal gevast við 1 mánað freist til uppathald seinast í einum mánað, tó so, at í skrivligum sáttmála kann longri uppsagnarfreist frá maskinmeistarans síðu fyrisetast, men treytað av, at uppsagnarfreistin frá SEV/IRF verður longd samsvarandi.

<u>Stk.4.</u> Uppsøgn skal verða givin seinast í mánaðinum frammanundan tí 1., sum uppsagnarfreistin byrjar.
Uppsøgnin má gevast í so góðari tíð, at maskinmeistari fær farið frá, innan starvstíðin er úti eftir einari eftir starvstíðini givnari uppsagnarfreist.

<u>Stk. 5</u> Uppsøgn av maskinmeistara verður at boða viðkomandi skrivliga við grundgeving fyri uppsøgnini.

Stk. 6. Ætlar setanarmyndugleikin at siga maskinmeistara úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latin starvsfólkinum til ummælis við 14 daga freist. Maskinmeistarafelagið fær fráboðan um, ar ætlanarskriv er sent maskinmeistara,

## § 21. Seming og tulking av sáttmálanum

Er sáttmálin uppsagdur, og partarnir ikki komnir ásamt, ella annar parturin ber seg undan samráðingum, binda partarnir seg til at fáa samráðingar framdar við uppílegging av semingsstovninum.
Stk. 2.
Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fastan Gerðarrætt.

## § 22. Maskinmeistarar í leiðandi størvum

Maskinmeistarar í leiðandi størvum hava ikki rætt til at leggja arbeiðið niður í samband við møguligar arbeiðsósemjur, verkføll o. l.
Hetta er galdandi fyri:
Deildarstjóran á framleiðsludeildini
Verkmeistaran og varaverkmeistaran á Sundi
Verkmeistaran á Fossáverkinum
Verkmeistaran á Strond
Verkmeistaran Vágsverkinum
Varaverkmeistarin á Vágsverkinum.

## § 23. Gildi sáttmálans

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2022, og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða freist til ein 1. í einum mánað, tó í fyrsta lagi sigast upp at fara úr gildi tann 30. september 2025.

## Protokolat

Partanir eru samdir um í sáttmálaskeiðinum at endurskoða flokkingar í §2 og størvini í §21 (nú §22) miðað verður eftir, at hetta arbeiði er liðugt áðrenn sáttmálasamráðingarnar 2025 byrja.

*Í Tórshavn, tann 12. desember 2024*

**Maskinmeistarafelagið**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**



*Tórshavn, tann 12.12.2024*

**Maskinmeistarafelagið**

Arnfinn Bech
Formaður

Regin Meyer Olsen
næstformaður

Rógvi K. Hansen
nevndarlimur

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Per Martin Gregersen
formaður

Anita Fuglø
leiðari

Bogi Bendtsen
nevndarlimur

Jóhannus Danielsen
nevndarlimur

Ískoytið

Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á SEV/IRF

## 1. Inngangur

Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleikar fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandi millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um at styrkja teir møguleikar, ið SEV/IRF hevur, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

Førleikamenning
Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á SEV/IRF
Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á SEV/IRF
Javnstøða

## 2. Førleikamenning

Leiðsla og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá SEV/IRF. Tað er tað arbeið, sum tey í tænastuni inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at SEV/IRF mennist.

Partarnir eru tí samdir um, at:

- miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri einum virkisfýsnum stovni við høgum tænastustigi.
- SEV/IRF skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur SEV/IRF at seta sær miðvís menningarmál.
- endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna tænastuførleikan.
- starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá SEV/IRF er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.
- sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðinum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk á SEV/IRF.

## 3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á SEV/IRF.

Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á SEV/IRF eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.

Tá ið SEV/IRF evnar sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:

**Niðursett tíð**

Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:
a) vera fylt 60 ár
b) hava starvast hjá SEV/IRF seinastu 10 árini
c) arbeiðstíðin skal vera minst hálvtíðarstarv, eftir tað, at hon er niðursett.

Starvsfólk kann fara upp í ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.
SEV/IRF kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

**Lægri starv**

SEV/IRF kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá SEV/IRF í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.

Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.

SEV/IRF kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á SEV/IRF.**

Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.

Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**

Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

Viðbøtur pr. mánað eftir § 1 stk. 2 í sáttmálanum

| 01.okt.22 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| a | 983,69 | g | 3.869,16 | m | 7.738,32 |
| b | 1.442,74 | h | 4.524,95 | n | 8.459,69 |
| c | 1.901,80 | i | 5.115,16 | o | 9.049,90 |
| d | 2.360,85 | j | 5.705,37 | p | 10.030,16 |
| e | 2.819,89 | k | 6.295,58 | q | 11.010,42 |
| f | 3.278,95 | l | 7.016,96 | | |

| 01.okt.23 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| a | 1.025,00 | g | 4.031,66 | m | 8.063,33 |
| b | 1.503,34 | h | 4.715,00 | n | 8.814,99 |
| c | 1.981,67 | i | 5.330,00 | o | 9.429,99 |
| d | 2.460,01 | j | 5.945,00 | p | 10.451,43 |
| e | 2.938,33 | k | 6.560,00 | q | 11.472,86 |
| f | 3.416,66 | l | 7.311,67 | | |

| 01.okt.24 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| a | 1.073,69 | g | 4.223,16 | m | 8.446,34 |
| b | 1.574,74 | h | 4.938,97 | n | 9.233,71 |
| c | 2.075,80 | i | 5.583,18 | o | 9.877,92 |
| d | 2.576,86 | j | 6.227,39 | p | 10.947,87 |
| e | 3.077,90 | k | 6.871,60 | q | 12.017,82 |
| f | 3.578,95 | l | 7.658,98 | | |

Viðbøturnar verða veittar av SEV/IRF í hvørjum einstøkum føri aftaná samráðingar við Maskinmeistarafelagið.